## DAGSINS MEINING

# Nýtt slag av stættamuni

Í sín landsfundarsamtykt vísir Javnaðarflokkurin á, at ósemjurnr í samgonguni forða fyri úrslitum. Tað, sum er farið fram, hetta síðan samgongan varð skipað av nýggjum við Miðflokkinum sum ískoyti vísir, at nakað er um atfinning Javnaðarfloksins. Tað tykist sum mestsum alt stjórnararbeiði uttan yvirtøkutilgongdin liggur meira ella minni lamið.

Javnaðarflokkurin vísir á landsfundinum á, hvussu stór og sera týdningarmikil mál liggja á láni ella verða avgreidd á ein sera óheppnan hátt. Víst verður eitt nú á, at stór og tung øki verða løgd út til kommunurnar at umsita. At leggja ávís málsøki nærri at borgarunum kann undir vanligum umstøðum bert vera til gangs fyri allar partar væl at merkja, um betri tænasta er endamálið. Men soleiðis er ikki við teimum útleggingum, sum nú verða framdar. Hesar verða bert framdar fyri at spara landskassanum pening. Hetta merkir við øðrum orðum, at játtan fylgir ikki við, tá málsøki verða løgd út. Hetta er beinleiðis óetiskt, tí tað kemur at merkja, at tænastustøðið verður ymiskt alt eftir, hvar ein býr í landinum. Tað er tí beint, tá Javnaðarflokkurin vísir á, at hesin politikkur fer at skapa eitt nýtt slag av stættamuni í Føroyum. Samgongan eigur tí at hugsa seg væl um, áðrenn hon heldur fram við útleggingum eftir hesum leisti.

Hetta sum gongur fyri seg er reinur fólkaflokkspolitikkur. Tað er tí ikki løgið, at formaður Fólkaflokksins proklamerar, at hann er sera væl nøgdur við samstarvið við Tjóðveldisflokkin, hóast hann samstundis lesur sama flokk niður í sand og øsku! Farið er jú av álvara undir at avmontera vælferðarsamfelagið. Hetta hevur altíð verið Fólkaflokksins mál, og tí kann flokkurin bert vera fegin um gongdina. Hetta merkir so aftur, at Javnaðarflokkurin hevur rætt, tá hann sigur seg vera einasta vinstravenda flokk eftir í Føroyum. Tjóðveldisflokkurin tykist at hava offrað sína vinstrahallu stevnu fyir fullveldispolitikkin. Hesin er tann prísur, sum Fólkaflokkurin krevur fyri at góðtaka yvirtøkurnar. Hetta er mikið spell og hartil púra óneyðugt. Tað hevði borið væl til at fingið bæði vælferð og sjálvstýri, um Javnaðarflokkurin hevði verið tikin við í samgongu. Men soleiðis vilja Fólkaflokkurin og Tjóðveldisflokkurin ikki hava tað, og úrslitið er minni vælferð og vaksandi stættamunur í samfelagnum. Fólkaflokkurin og Tjóðveldisflokkurin áttu at umhugsa støðuna av nýggjum, áðrenn ov seint er.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Ein virkin familjupolitikkur – ein íløga í framtíðina

**Jóannes Eidesgaard**



Søgan um føroyska vælferðasamfelagið er eisini søgan um familjurnar í Føroyum.

Familjurnar eru grundarlagið undir føroyska samfelagnum, og tað er ein stór avbjóðing, men eisini skylda hjá politikkarum og politiskum flokkum at geva familjunum góð kor at liva undir.

Í menningarlondum eru børnini sosiala trygdin hjá familjunum. Hesi lond hava eitt stórt burðaravlop, og fólkatalið økist støðugt. Trygdin hjá foreldrunum er, at tá tey gerast gomul, hava tey børn, sum kunnu forsyrgja teimum. Til ber at siga, at børnini eru teirra pensión - teirra eftirløn.

Sjálvt um vit ikki beinleiðis hugsa um, hvør skal forsyrgja okkum í framtíðini, er hetta tó nógv meira nærliggjandi, enn vit geva okkum far um.

Eitt er vist, at uttan ein støðugan fólkavøkstur - eitt gott burðaravlop, verða færri og færri herðar at bera samfelagsins byrðar. Tey sum bera, verða færri - og tey sum verða borðin, verða fleiri. Hetta er veruleikin í okkara grannalondum, og tað er líkt til, at tey fara at verða rakt av teirri nógv umrøddu eldrabylgjuni.

Men støðan í Føroyum er als ikki so hættislig. Myndin nú er, at Føroyar ikki verða skolaðar út av eldrabylgjuni.

Eitt sindur av einari andsøgn at tosa um økta talið av eldrum sum ein trupulleika, tí økingin er jú úrslitið av einum málrættaðum politikki, sum serliga Javnaðarflokkurin hevur ruddað slóð fyri.

Sagt verður, at til tess at fólkatalið í einum landi ikki skal minka, skal landið hava eina sokallaða reproduktiónsratu uppá 2,2, t.v.s. at foreldur skulu í miðal eiga 2,2 børn. Til samanberingar skal nevnast, at henda rata í Danmark, Noregi og Svøríki er í miðal 1,7.

Í Føroyum hava vit higartil verið so heppin at hava eina reproduktiónsratu ímeðal frá 1998 til 2003 uppá 2,47 t.v.s. munandi hægri enn okkara grannar. Men eingi trøð veksa inn í Himmalin. Tendensurin frá 1970 er, at reproduktiónsratan er støðugt minkandi, hóast vit enn eru á heilt góðari leið.

Eitt minkandi fólkatal kann fáa álvarsamar fylgjur fyri ein búskap og fyri eitt land. Fellur fólkatalið kann fara at standa á at fáa arbeiðsmegi til tær uppgávur, almennar og privatar, sum samfelagið hevur at røkja. Vit koma tá at merkja eitt afturstig í menningini av samfelagnum.

Eins neyðugt tað er í menningarlondum at fáa fleiri børn til tess at hava eina sosiala trygd, eins neyðugt er tað hjá okkum at gera umstøðurnar hjá familjunum so góðar, at tær ynskja at fáa fleiri børn - tí børnini eru okkara sosiala trygd.

Tað er tí meira átrokandi nú enn nakrantíð, at vit fáa ein sterkan og progressivan familjupolitikk.

# Rækjuflotin

**Marjus Dam**
*løgtingsmaður*



Vinnan má ikki stuðlast!

Ímeðan hetta verður sagt, verður sera lítið hugsa um okkara almennu fyrisiting, íð verður stuðlað - uttan at nakað spurnaðartekin verður sett, um vinnan megnar at bera ivirbygnaðin. Tað tykist, sum um almenna umsitingin kann vaksa ótálmað. Og hvønn verður rokningin send til? Vinnuna — ið skal gjalda við minkandi kappingarføri

### Grundstuðul

Vinnan er grundstuðulin í samfelagi okkara. Hjá okkum er tað fiskivinnan, ið alt hvílir á.

Tí kann hendan vinna als ikki stuðlast. Hon ber jú øllum uppi.

Men vinnan kann saktans missa kappingarføri — serliga orsakað av, at almenni yvirbygnaðurin fær loyvi at vaksa ótálmaður, sum vit hava sæð tey seinastu árini. At Fólkaflokkurin hevur ein forkláringstrupulleika er eyðsýnt. 10 Landstýrismenn við teirra umsiting eru bert eitt dømi. Og almenna trongdin eftir at seta nýgg stýrir og stjórar at kanna aðrar stjórar er spakuliga við til at oyðileggja okkara vinnu og samfelag. M.a. okkara rækjuvinnu.

Eg eri errin av, sum sambandsmaður, at hava verið við til at seta fram uppskot um at kanna viðurskiftini hjá okkara fjarfiskiflota. Fólkaflokkurin og samgongan hava onki gjørt við hetta umráði, ið hevur fingið verri og verri umstøður seinastu árini. Samgongan tykist ikki hava havt tíð at tikið sær av hesum viðurskiftum seinastu 5 árini. Teir hava havt annað at gera - nevniliga at yvirtaka. Og síðan eisini at senda hesa rokning víðari til vinnuna — ið nú er hoykna undan fleiri staðir í samfelagi okkara.

Nú er rækjuflotin allur í svárari kreppu.

Vónandi raknar Fólkaflokkurin við úr loysingarrúsinum og tekur undir við uppskoti Sambandsflokksins, um at vera við til at bjarga rækjuflotanum úr tí ódn teir eru í.

Eg ivist ikki eina løtu í, at um vit gera nakað skilagott nú, so kann gongdin vendast, Føroyum at gagni.

Um vit onki gera, so verður vanlukkan nærum eins stór sum tá ríkisveitingin var skerd á sinni.

Latið okkum varðveita føroysk arbeiðspláss, tilfeingi og góð vinnutól her á landi. Hví missa alt av hondum orsaka av politiskum ódugnaskapi?

Rækjuflotin má bjargast!

Tað tykist sum serliga Tjóðveldisflokkurin bert hugsar um at avhøvda mest møguligan part av vinnuni. Við at oyðilegga karmarnar hjá vinnuni — og so geva ríkisfelagsskapinum skyldina.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




# Eldrafelagið Nón hevur keypt felagshús

**Runavíkar kommuna hevur stuðlað keypinum við ikki færri enn 300.000 krónum. – Hetta er eitt velduga gott íkast, sum vit eru ógvuliga fegin um, sigur formaðurin í felagnum, Amy Djurhuus**



*5. januar komandi ár yvirtekur eldrafelagið Nón hesi húsini, sum verða karmur um virksemið hjá felagnum framyvir.*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

ELDRAØKIÐ
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Eldrafelagið Nón, sum serliga hevur limir av Skálafjørðinum, hevur nú keypt felagshús. Talan er um húsini hjá Hans Jakka og Asleyg Højgaard, sum standa í Torvgøtu í Saltangará. Húsini eru í trimum hæddum, har mið-og loftshæddin eru innrættað. Stórur kjallari er eisini, og har eru onkrir veggir, sum felagið ivaleyst fer at taka niður. Ætlanin er eisini at taka onkrar veggir niður á loftinum, soleiðis at rúmini gerast betur egnaði til felagshølir. Húsini í Torvgøtu eru eini 30 ára gomul, men tey eru í góðum standi, og nossligt er uttan um. Prísurin er 1,3 milj. krónur.

### Fegnast um stuðul

Amy Djurhuus, sum er formaður í eldrafelagnum, sigur, at húsakeypið er ein stór íløga, men hon heldur ikki, at íløgan er óyvirkomilig hjá felagnum, sum hevur stívliga 150 limir.

– Tá ið vit fóru at arbeiða við hesi æltan, sendu vit út áheitanir til vinnulívið um stuðul. Móttøkan hevur verið positiv. Nú avgerðin um keyp er tikin, og yvirtøkudagurin er ásettur at verða, 5. januar komandi ár, vænta vit, at okkurt meira ítøkiligt fer at spyrjast burtur úr áheitanini.

Amy sigur, at felagið er ógvuliga fegið um tann stuðul, sum higartil er veittur.

– Runavíkar kommuna hevur stuðlað keypinum við ikki færri enn 300.000 krónum, og hetta er eitt velduga gott íkast, sum vit eru ógvuliga fegin um, leggur hon dent á.

### 16 ár á baki

Eldrafelagið Nón hevur stívliga 16 ár á baki. Tað var arbeiðarafelagið, Hæddin í Saltangará, sum tók stig til at stovna felagið, og øll árini hevur felagið havt innivist til tey ymisku tiltøkini, ið skipað hevur verið fyri, í hølunum hjá arbeiðarafelagnum.

– Vit hava altíð havt tað gott í Hæddini og eru altíð sloppin inni í hølini, tá ið hugur hevur verið til tess, og hølini vóru tøk. Í dag vil meirilutin í felagnum, at vit skulu hava okkara egnu høli, og tað er hetta stigið, vit nú hava tikið, sigur Amy.

Hon er ógvuliga fegin um, at Nón nú hevur fingið hendur á egnum hølum og væntar, at aktivitetirnir hjá felagnum fara at mennast.

– Ætlanin er, at fólk skulu kunna koma í húsini og gera eitt hvørt handaligt arbeiði hvønn dag – ella bara støkka inn á gólvið til prát og hugna. Nú kunnu vit hava alt tað, vit fáast við, standandi til næstu ferð, men slíkt ber ikki til, tá ið tú ert í hølum hjá øðrum, sum eisini verða brúkt til onnur endamál, sigur Amy.

### Ymisk tiltøk

Limirnir í Eldrafelagnum Nón plaga at hittast tvær ferðir um mánaðin í vetrarhálvuni, men hetta er ov lítið, heldur formaðurin.

– Tá ið langur leygardagur er í kommununi, plaga vit at hava tombola og kaffisølu. Vit skipa fyri regluligum bingo, og onkuntíð hava vit havt eydnuhjól. Seinasta eydnuhjólið, vit høvdu, gav 55.000 krónur netto. Hetta var í Støkkhøllini, og vit vóru ovfarin av teirri undirtøku, sum tiltakið fekk. Ætlanin er at hava eydnuhjól aftur til várs.

Amy sigur, at felagið umhugsar at hava ymiskar aktivitetir í nýggju hølunum, sum felagið ikki hevur í dag.

Hon sigur, at tosað hevur verið um møguliga at hava "bed and breakfast" um summarið, og somuleiðis hevur felagið í hyggju at kunna leiga kjallaran út til ymiskar aktivitetir, sum eru komandi og farandi.

– Enn er nakað tronligt við parkeringsviðurskiftum, har húsini standa, men Runavíkar kommuna hevur í fyrstu syfti lovað at gjørt okkum nøkur parkeringspláss niðanfyri garðin.

Amy sigur, at ætlaninar um húsakeyp fingu eitt rættiligt skump, tá ið Nón hevði eldravitjan úr Danmark í summar.

### Menninir eru við

Limatalið hjá felagnum í dag er 153, teir flestu av Skálafjørðinum.

– Men vit hava eisini limir í Elduvík, Funningi – og enntá í Klaksvík, Havn og á Sandoynni. Hetta er í fyrsta lagi fólk, sum hava eitthvørt tilknýti til Eysturoynna, sigur hon.

Amy Djurhuus vísir á, at talið av mannfólki, sum møtir upp til aktivitetirnar hjá felagnum, er næstan líka so stórt, sum talið av konufólki.

– Vit hava skilt, at onnur feløg hava torført við at fáa menninar at taka lut í felagsarbeiðinum, men soleiðis er ikki hjá okkum, sigur formaðurin í Nón at enda.

Á páskum vóru 40 limir í eldrafelagnum á vitjan í Danmark.

# Sofus Poulsen skal leiða Kollafjord Pelagic

**Felagið, sum eigur Kollafjord Pelagic, hevur gjørt av at seta Sofus Poulsen til nýggjan stjóra á virkinum í Kollafirði eftir Johan Dahl, sum hevur biðið um at verða loystur úr starvi**

NÝGGJUR STJÓRI
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@jacobsen*

Nevndin í felagnum, sum eigur stóra pelagiska virkið í Kollafirði, Kollafjord Pelagic, hevur sett Sofus Poulsen, sum nýggjan stjóra á virkinum eftir Johan Dahl.

Sofus er stjóri á Rækjuvirkinum á Oyri, har hann hevur sína uppsagnartíð. Væntrandi byrjar hann í nýggja starvinum tíðliga í komandi ári.

Anfinn Olsen er nevndarlimur í felagnum, sum eigur virkið í Kollafirði, og hann váttar, at nevndin hevur avgjørt at seta Sofus í stjórastarvið.

Sosialurin royndi at fáa orð á Sofus í gjár, men tað eydnaðist okkum ikki.

### Byrjar aftur

P/F Faroe Estate, sum eigur Kollafjord Pelagic, varð endurstovnað í august í ár. Sáttmálar um útvegan av nýggjum frystiútbúnaði og tillagingum av framleiðsluútbúnaðinum eru gjørdir, og arbeiðið at lata virkið í Kollafirði uppaftur er í gongd.

Ætlandi verður felagið klárt at fara undir framleiðslu aftur um árskiftið.

Johan Dahl, sum í dag er stjóri í felagnum, hevur biðið um at verða loystur úr starvi, 1. januar komandi ár – ella so skjótt, sum felagið hevur funnið nýggjan stjóra.

Nýggi maðurin í stjórastarvinum verður so Sofus Poulsen.



*Sofus Poulsen, stjóri á Rækjuvirkinum á Oyri, verður nýggjur stjóri á Kollafjord Pelagic*